Bergur Berg

Fra: Katrin Joensen
Sendt: 9. marts 2023 10:09
Til: Bergur Berg; Almanna- og mentamálaráðið
Emne: Viðmerkingar frá Føroya Stiftsstjórn til: Lógaruppskot til ummælis – við SERSTAKLIGA stuttari freist
Vedhæftede filer: 23_04306-7 Proustauppg uppsk at broyta L um Folkakirkjunai FO 1208234_723900_0.DOCX

Viðmerkingar til lógaruppskot um broyting í Løgtingslóg um fólkakirkjuna.
Vísandi til viðhefta uppskot um tillaging til verandi løgtingslóg um fólkakirkjuna í Føroyum, er tað í trá við upprunaliga endamálið.
Møguleikin fyri fleiri próstadømum er umrøddur fleiri ferðir í kirkjuliga landslagnum við tí endamáli at lætta um fyrisitingarligu uppgávurnar hjá dómpróstinum. Men mett verður, at rættara loysnin í núverandi støðu hjá Fólkakirkjuni er at varðveita eitt próstadømi í Føroyum við einum dómprósti, og heldur seta ein próst afturat at varða av nøkrum av fyrisitingarligu og eftirlits uppgávum hjá verandi dómpróstinum.
Lógarbroytingin vil lætta um arbeiðsbyrðuna hjá dómpróstinum, og samstundis viðføra at fyrisitingarligar uppgávur framyvir vera framdar í trá við góðan fyrisitingarligan sið.

Føroya Stiftsstjórn hevur ikki aðrar viðmerkingar.

Vinaliga

Katrin Joensen
Stiftsfulltrúi

Fartel. +298 23 73 21

Fólkakirkjan

Fra: Bergur Berg <BergurB@ammr.fo>
Sendt: 8. marts 2023 13:52
Til: Jógvan Fríðriksson <jf@kirkjan.fo>; Dagbjørt Ólavsdóttir Hansen (doh@email.fo) <doh@email.fo>; Prestafelagsformaður (theol@hotmail.com) <theol@hotmail.com>
Emne: Lógaruppskot til ummælis – við SERSTAKLIGA stuttari freist

Almanna- og mentamálaráðið sendir við hesum Felagnum fyri Kirkjuráðslimir, Prestafelagnum og biskupi uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkakirkjuna í Føroyum (Heimild at býta upp embætisuppgávur millum próstar) til ummælis.

Uppskotið er heft við hesum teldubrævi.

Leggið til merkis, at ummælisfreistin er sera stutt, hon er tíverri einans til næsta mánadag á middegi.

Endamálið við uppskotinum er at útvega greiða heimild til, at landsstýrismaðurin eftir tilmæli Stiftsstjórnarinnar kann gera av, at tveir próstar skulu vera í próstadøminum, og eftir tilmæli biskups býta upp embætisuppgávurnar innihaldsliga teirra millum, og gera av, hvør teirra skal vera limur í próstadømisráðnum.

LM-087/2022

Uppskotið er gjørt eftir tilmæli frá Stiftsstjórnini, og er gjørt soleiðis, at tá broytingin er framd, fer at bera til at velja ímillum annaðhvørt eitt slíkt innihaldsligt uppbýti millum próstar, at venda aftur til bert at hava eitt próstaembæti (sum so verður dómpróstur) ella at býta upp í fleiri próstadømi.

Talan er sostatt um at seta ein valmøguleika afturat, meðan onki annars verður broytt í mun til møguleikarnar í galdandi skipan.

Ítøkiliga er ætlanin nú, at eitt komandi próstaembæti fyrst og fremst skal røkja viðurskifti viðvíkjandi starvsfólkaviðurskiftunum hjá sóknarprestunum, kirkjubókaføring og aðrari fyrisitingarligari embætisførslu hjá teimum, soleiðis at dómpróstur fær tíð til at leggja størri orku í arbeiðið viðvíkjandi fíggjarviðurskiftum fólkakirkjunnar og har afturat tengdum uppgávum; men uppskotið er orðað soleiðis, at innihaldsliga uppbýtið kann verða øðrvísi eina aðru ferð, um biskupur mælir landsstýrismanninum til tess.

Orsøkin til, at freistin er so stutt er, at um til skal bera at fáa tillagaðu skipanina at virka í ár, er neyðugt at broyta lógina í verandi tingsetu. Skal nakar møguleiki vera fyri tí, má uppskotið vera Løgtinginum í hendi longu nú týsdagin. – Annars kann tað í fyrsta lagi verða lagt fyri tingið á ólavsøku. Tá kann tað í fyrsta lagi koma í gildi einaferð í heyst, og tá fer tað ikki at kunna gera mun fyri arbeiðið í ár.

Tit eru væl komin at venda tykkum til undirritaða, um nakað er at spyrja um ella umrøða í hesum sambandi, eisini um kvøldið ella í vikuskiftinum.

Vit skulu sum sagt biðja um at fáa ummæli í seinasta lagi longu nú mánadagin 13. mars kl. 13:00.

Vinarliga / Kind regards

Bergur Berg
fulltrúi/senior principal

Almanna- mentamálaráðið/Ministry of Social Affairs and Culture
Eirargarður 2 • 100 Tórshavn • Faroe Islands
Tlf. +298 555043
bergurb@ummr.fo • **www.ammr.fo**